## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin og hósdagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og eystri, turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga sirm og mjørki. Hitin millum 12 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 11 og 15 stig.

# 107 ára gamalt til fótbóltsdyst

**At eitt 107 ára gamalt kemur úr Hetlandi til fótbóltsdyst millum Skotland og Føroyar ljóðar kanska løgið, men mánadagin kom seglskipið Swan á Vág og skipið er bygt í ár 1900 og er einasta skip, ið eftir er av sínum slag**

SKIP OG FÓTBÓLTUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Mánamorgunin sást Swan liggja við bryggju í Vági. Swan er seglskip og er einasta av sínum slag, ið eftir er í heiminum. Skipið er bygt í ár 1900 og er sostatt 107 ára gamalt. Fyri nøkrum árum síðani bleiv Swan settur í stand og grunnurin Swan yvirtók raksturin. Skipið verður nýtt til at leiga út og 3 mans eru altíð við skipinum, tá skipið er á ferð.

Landsdystur

Ferðin til Føroya hesaferð kemst tó mest av landsdystinum millum Føroyar og Skotland.

Nakrir av teimum ið vóru umborð á Swan, hava mangan verði í Føroyum áður, onkur sum fiskimaður og ein hevði leikt móti TB. Swan fór úr Vági aftur seinnapartin mánadagin, eftir at fólkið hevði leitað sær ein túr í Vági, runt vatnið og vestur á Eiðið, ímeðan sólin skein bæði oman og niðan. Serliga hugtikin vóru tey ferðandi av, at fótbóltsvøllurin næstan lá heilt úti við eggina. Leiðin hjá Swan gekk norður til Havnar, áðrenn tey leita sær inn á Toftir til dystin mikukvøldið.




*Swan á Vági, í baksýni sæst sluppin Johanna*
*Mynd: Finn Johannessen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 23 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 35 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 26 |
| Sydney | 16 |
| New York | 18 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 27 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1036 hPa. við Føroyar fer spakuliga í landnyrðing og viknar nakað.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Norska Havinum viknar framvegis. Lágtrýstið vestan fyri Ísland grynnist og brúgvalagið haðani til havið sunnan fyri Ísland stendur fyribils í stað.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/6 kl. 06⁰⁰ – 5/6. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,0°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 4/6 kl. 06⁰⁰– 5/6 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 3,0 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum í juni**




- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

**5. juni**
Ungmannfelag Miðfloksins

**12. juni kl. 19**
Málaratiltak

**14. juni**
Blóðgevarafelagið

**27. juni kl. 21**
Summartónar

## VESTFALLSKYRRINDI

23. mai — Fyrra kvarter
27. mai — Mánin longst frá jørðini
1. juni — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. Juni | 10.55 | 23.17 | 09.55 | 22.17 | 10.10 | 22.32 | 00.31 | 12.55 | 01.31 | 13.55 | 09.10 | 21.32 | 08.10 | 20.32 | 11.10 | 23.32 | - | 12.10 | 10.40 | 23.02 | 11.55 | - |
| 6. Juni | 11.40 | - | 10.40 | 23.01 | 10.55 | 23.16 | 01.17 | 13.40 | 02.17 | 14.40 | 09.55 | 22.16 | 08.55 | 21.16 | 11.55 | - | 00.32 | 12.55 | 11.25 | 23.46 | 00.17 | 12.40 |
| 7. Juni | 00.01 | 12.22 | 11.22 | 23.57 | 11.37 | - | 02.01 | 14.22 | 03.01 | 15.22 | 10.37 | 23.12 | 09.37 | 22.12 | 00.16 | 12.37 | 01.16 | 13.37 | - | 12.07 | 01.01 | 13.22 |
| 8. Juni | 00.57 | 13.32 | - | 12.32 | 00.12 | 12.47 | 02.57 | 15.32 | 03.57 | 16.32 | 11.47 | - | 10.47 | 23.21 | 01.12 | 13.47 | 02.12 | 14.47 | 00.42 | 13.17 | 01.57 | 14.32 |
| 9. Juni | 02.06 | 14.41 | 01.06 | 13.41 | 01.21 | 13.56 | 04.06 | 16.41 | 05.06 | 17.41 | 00.21 | 12.56 | 11.56 | - | 02.21 | 14.56 | 03.21 | 15.56 | 01.51 | 14.26 | 03.06 | 15.41 |